


**Láturterapi**
Er langt ímillum láturanføllini, kundi tað verið eitt hugskot at farið til láturterapeut og loyst upp fyri lívsgleðini aftur. Vivian Sjóðklett hevur arbeitt við látri í 10 ár, og hon kann bókast á vsjoklett@gmail.com ella á facebook. Hon gevur ymisk góð ráð og hjálpir fólki at finna flennið aftur.



# Hjartaligur látur leingir lívið

*Látur er góður fyri lunguni*

*Látur styrkir immunverjuna*

*Látur er pínudoyvandi*

EITT 4 ÁRA GAMALT **BARN FLENNUR** UMLEIÐ **400** FERÐIR UM **DAGIN**. VAKSIN **FLENNA** BERT **15** FERÐIR **DAGLIGA** Í MIÐAL. **KANNINGAR** VÍSA **HARUMFRAMT**, AT VIT Í DAG BERT **FLENNA** EIN **TRIÐING** AV TÍ, SUM TEY **FLENTU** FYRI **50** ÁRUM **SÍÐANI**. TAÐ ERU **NÓGVAR** GÓÐAR **ORSØKIR** TIL, AT VIT **EIGA** AT FLENNA **MEIRI** OG **OFTARI**, TÍ **LÁTUR** ER **GÓÐUR** FYRI BÆÐI **KROPP** OG SÁL




*Látur er góður móti angist og depressión*

**Rio**
Rio er ein nýggjur animeraður filmur frá teimum, ið gjørdu Ice Age, og tað skuldi borgað fyri einum góðum látri. 3D animeraður filmur, sum hevur heimsframsýning 14.04.

**Mini Shopaholic**
Nógvar bøkur fáa teg at flenna hart. Sonevnda chick-lit genran er væl umtókt. Í fjørheyst kom nýggjasta bókin hjá Sophie Kinsella út. Hon eitur »Mini Shopaholic«.




*Látur økir um evnini at læra*

*Látur gevur innaru gøgnunum betri blóðførslu*

*Látur minkar um fleiri av strongdarhormonunum*




**The dum people**
Googlar tú »funny« tekur tað 0,11 sekund at finna 850.000.000 hits. So har burdi verið okkurt fyri ein og hvønn humor. Til dømis hetta klassiska brotið við Dean Martin og Goldie Hawn um »The dum people«.

*Látur er góður fyri giktsjúk*

*Látur er góður fyri sukursjúk*

*Látur betrar um svøvnin*

*Látur økir um kreativitetin*

*Látur er góður fyri hjartað*




**Omar, omskåret**
Ein av kendastu donsku komikarunum, Omar Marzouk, hevur júst givið sítt nýggjasta stand-up show út á DVD, kallað »Omar, omskåret«. Showið hevur fingið sera góð ummæli.



**Bakaríið**
Nýggja leygarkvøldssendingin á Rás1 við m.ø. satiru og føroya festligasta verti, Jákup Veyhe, kann helst eisini fáa mong at flenna.